## Nýtt viðhaldsfelag sett á stovn

Red Lions er eitt felag fyri viðhaldsfólk hjá Havnar Bóltfelag. Í seinastuni hevur verið tosað um at savnað HB viðhaldsfólkini í eitt felag, fyri betri at kunna stuðlað fremsta liðinum hjá Havnar Bóltfelag. Nú er hetta tos vorðið veruleiki. Nýggja viðhaldsfelagið eitur Red Lions.

Red Lions er eitt limafelag, sum er til fyri at stuðla formulaliðinum hjá Havnar Bóltfelag. Limirnir í Red Lions eru fólk sum á ein hvønn hátt vilja stuðla HB liðinum at stríðast á vøllinum. Limafelagið er fyri øll; ung sum gomul. Aðalmál felagsins eru hesi:

- At savna viðhaldsfólkini hjá HB í eitt felag
- At stuðla formulaliðnum hjá Havnar Bóltfelag
- At skapa góðar og litríkar karmar til dystirnar hjá formulaliðinum hjá Havnar Bóltfelag
- At eggja øllum áskoðarum at sýna siðiligan atburð

Visjónin er, at Red Lions skal verða størsta og besta viðhaldsfelag í landinum. Limir felagsins skulu av sonnum verða 12. maður hjá formulaliðnum hjá Havnar Bóltfelag, og vilja, eins og leikararnir á vøllinum, stríðast fyri sigri hvørja ferð. Tað skal verða stuttligt at vera til fótbóltsdyst, og viðhaldsfelagið vil gera sítt til, at so verður framyvir.

Komandi mikukvøld kl. 18 verður finalan í kappingini um Løgmanssteypið. Tá tørna EB/Streymur og HB saman í Gundadalið, og tá verða Reyðu Leyvurnar eisini til staðar. Longu kl. 16 hittast viðhaldsfólk hjá HB í HB Húsinum til at hita upp til spennandi dystin. Har verður møguleiki at tekna seg sum lim í Red Lions. Tá fara leyvurnar at brøla fyri fyrstu ferð.

# hvørvinum



*Føroyar mangla eina tilbúgvingarætlan fyri vernd av havumhvørvinum. Hetta sigur stjórin á Tilbúgvingarstovninum, Anni á Hædd, sum saman við virkandi leiðaranum á umhvørvisdeildini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Jóhannu Olsen, hevur havt úr at gera við uppruddingini eftir Olshanu óhappinum*

Olshanu, og Føroyar vóru ikki klárar at lofta umhvørvisspurninginum á ein nøktandi hátt, staðfestir Anni á Hædd.

Tá óhappið hendi tilkallaði tilbúgvigarstovnurin beinanvegin umhvørvisdeildina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Tey mæltu til, at oljan varð tikin úr skipinum beinanvegin, men tilráðingarnar og metingarnar frá teim serkønu á MRCC vigaðu tingri.

Hóast Anni á Hædd ikki heldur tað vera skeivt, at mannalív raðfestast hægri enn umhvørvið, so leggur hon dent á, at ein tilbúgvingarætlan hevði gjørt arbeiðið greiðari og skjótari.

### Mangla uppskriftsbókina

Jóhanna Olsen, virkandi leiðari á Umhvørvisdeildini, sigur, at teirra arbeiði gekk serstakliga væl, tí tey hava ein innanhýsis tilbúgvingarleist við ábyrgdarbýtið og mannagongdum, og henda ætlan varð fylgd, tá deildin varð innkallað. Øll vistu, hvør gjørdi hvat, hvør skrásetti náttúruvirðir, hvør skrivaði log og so víðari.

– Um eingin ætlan fyriliggur, er skjótt til, at øll bara renna runt sum hønur, tá vit standa mitt í kreppuni, sigur Jóhanna Olsen og greiðir frá, at Umhvørvisdeildin hevur havt fleiri venjingar, har mannagongdir og ábyrgdøkir eru gjøgnumgingin.

Anni á Hædd sigur, at samarbeiðið við Umhvørvisdeildina gekk væl, júst tí tey vóru so væl fyrireikað.

Men ein yvirskipað uppskriftsbók ella handbók manglar.

Orsøkin til at Føroyar onga tilbúgvingarætlan hava fyri umhvørvisvernd er ikki, at lógir ella yvirtøkur mangla.

– Tað einasta, sum manglar, er at vit seta okkum niður og gera ætlanina.

Tá ætlanin er gjørd, kunnu tilmæli gerast um, hvørja útgerð tørvur er á. Síðani kemur politiska raðfestingin, hvussu nógv ynskja vit at vera før fyri at taka okkum av, hvussu nógv útgerð skal vera tøk, og hvussu nógvar pengar vilja vit brúka til umhvørvisvernd, greiðir Anni á Hædd á.

– Vit vita ikki nær og hvar, men vit vita, at næsta óhapp kemur. Um vit ikki hava megna at fingið eina tilbúgvingarætlan áðrenn næsta óhapp, so verður støðan júst tann sama. Vit vera ákkurat líka illa fyri at taka okkum av umhvørvinum, staðfestir Anni á Hædd.

### Samskifti ikki nóg gott

Torbjørn Jacobsen, tinglimur fyri Tjóðveldisflokkin, hevur í fyrispurningi til landstýrismannin við fiskivinnumálum sett spurning við førleikarnar hjá tilbúgvingarleiðsluni.

Anni á Hædd heldur, at tað er burtur við at fílast á hennara manglandi maritima kunnleika. Starvslýsingin til starvið sum stjóri segði onki um siglingstíð ella royndir á sjónum.

– Ein stjóri skal hava yvirlit og duga at brúka tann serkunnleika, sum er á stovninum. Og starvsfólkini á MRCC hava bæði royndir og útbúgving.

Hinvegin var tað eitt krav í starslýsingini, at stjórin skuldi duga væl at samskifta. Anni á Hædd viðurkennur, at samskifti á stovninum ikki gekk nóg væl í samband við Olshana óhappið.

– Alt samskifti gekk gjøgnum MRCC, og har kunnu vit bara staðfesta, at partarnir ikki vóru nóg væl kunnaðir alla tíðina. MRCC sat inni við allari vitanini og vit høvdu yvirlitið. Men tá partarnir ikki altíð vita, hvat hendir, kann tað elva til ørkymlan, viðgongur Anni á Hædd.

– Hetta var okkara feilur, og tað átaki eg mær ábyrgdina av. Men um vit skulu sleppa undan somu trupuleikum næstu ferð, hevur tað alstóran týdning, at allar mannagongdir, samstarvsavtalur og leiðsluvegir verða útgreinað í einari yvirskipaðari tilbúgvingarætlan, leggur Anni á Hædd áherðslu á.

Stjórin á Tilbúgvingini vónar, at Olshana óhappið kann seta ferð á fyrireikingarnar av eini tilbúgvingarætlan. Politikarnir áttu í øllum førum at vita, hvørjir trupuleikarnir eru.

– Allar lógirnar eru so nýggjar, at sitandi politikarar hava allir verið við til at samtykkja tær, staðfestir Anni á Hædd. Teir eiga at vita, at tilbúgvingarætlan manglar, at onki krav er um loðs, at tilbúgvingin er spjadd yvir fleiri aðalráð, og at havumhvørvið hongur í leysum gekki.

## Spurningurin um loðs ikki nýggjur

Eftir óhappið við Olshanu hevur kjak tikið seg upp, antin tað skal vera eitt krav, at útlendsk skip hava loðs, tá tey sigla í føroyskum firðum.

Við Kringvarpið hevur landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, sagt, at hann arbeiðir við eini kunngerð, sum skal áseta, at fremmand skip skulu hava loðs.

Men spurningurin um loðs er ikki nýggjur.

Í 2001 varð lógin um trygd á sjónum samtykt. Lógin heimilaði landsstýrismanninum í fiskivinnumálum at áseta reglur fyri brúk av loðsi í innanoyggja sigling, men ongar slíkar reglur vórðu gjørdar.

Í 2003 legði Johan Dahl fram uppskot um lógarkravda loðsskyldu fyri skip yvir 50 brutto-tons. Málið varð beint í vinnunevndina, har meirilutin (Henrik Old, Heini O. Heinesen, Tórbjørn Jacobsen, Gerhard Lognberg og Heðin Zachariasen) ikki hildu, at tað var neyðugt við lógarfestum kravi, tí landsstýrismaðurin longu hevði heimild at áseta reglur um brúk av loðsi í innanoyggjasigling.

-Meirilutin mælir tí uppskotssetaranum til at brynja seg við toli fram til byrjanina av næstu tingsetu, soleiðis at landsstýrismaðurin fær ein møguleika at taka málið upp.

Nú – fýra ár seinni – eru framvegis ongar reglur um loðs.

## Føroyingar lítlan áhuga fyri umhvørvinum

Kristina Rørbo gjørdi í 2004 eina kanning av støðu føroyinga til náttúru- og umhvørvisfyrisiting.

Frágreiðingin staðfestir, at Føroyar brúka ein nógv minni part av fíggjarlógini til umhvørvisfyrisiting enn Ísland, Svøríki og Danmark – umleið helvtina so nógv.

Umhvørvismál eru heldur ikki so nógv frammi í Føroyum. Kristina Rørbo vísir á, at meðan grannalondini hava óheft ráð, sum taka kjak upp um ymisk mál innan umhvørvisvernd og ráðgeva politikarum og myndugleikum, so er onki líknandi føroyskt ráð.

Í grannalondunum hava áhugafeløg, sum t.d. Danmarks Naturfredningsforening eisini ein týdningarmiklan leiklut. Men soleiðis er ikki í Føroyum.

Politiski leikpallurin endurspeglar ein øðrvísi hugburð. Næstan helvtin av føroyingunum í kanningi halda ikki, at náttúran er hótt. Hetta er á leið dupult so nógv sum í Íslandi, Danmark og Svøríki.

Kanningin vísir, at føroyingar í størri mun enn fólk aðrastaðni halda, at umhvørvismál mugu raðfestast eftir, um tey tæna virðum, vælferð og áhugamálum hjá menniskjum. Við øðrum orðum, hevur eitt reint umhvørvið onki virði í sær sjálvum, men bert tí tað tryggjar okkum góðan prís fyri fisk.

Kanningin av, hvørja áskoðan føroyingar hava til umhvørismál og umhvørvisfyristing, varð gjørd í 2004.

Havumhvørvisverndin hongur hinvegin í leysari luft.